# Dramatisk bjarging av bili



*Annar froskmaðurin er júst komin upp, og hann er sjónliga illa fyri. Tíbetur fær hann fatur á endanum á krananum, og har krøkir hann seg fastan, meðan hann roynir at fáa luft aftur*
Mynd: Terji Nielsen



*Makkarin hjá froskmanninum er nú komin upp at hjálpa, og saman við sløkkiliðsfólki og løgreglu á landi fáa teir løtu seinni illa fyrikomna froskamannin upp á turt, har hann kemur fyri seg*
Mynd: Terji Nielsen



*Bilurin hjá Skipafelagnum verður togaður upp aftur av havsins botni, men hann verður ongantíð aftur til bil.*
Mynd: Terji Nielsen

**Beint fyri døgurða leygardagin fór ein bilur á sjógv úti á molanum í Havn. Bilurin fleyt í vatnskorpuni í einar 10-15 minuttir, áðrenn hann fór til botns. Eingi fólk vóru í bilinum, men tá ið hann skuldi fáast upp á turt aftur, gjørdist tað eitt sindur dramatiskt**

BJARGING
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Talan var um ein arbeiðsbil hjá Skipafelagnum, sum fór á sjógv. Eitt starvsfólk hjá Skipafelagnum var og hugdi til nakrar bingjur, sum stóðu nokk so uttarlaga á molanum, og meðan hann hyggur til bingjurnar, varnast hann, at bilurin er á veg á bláman. Maðurin royndi at steðga bilinum, men ov seint var.

Bilurin fleyt í vatnskorpuni eina góða løtu og rak inn eftir framvið bryggjukantinum, áðrenn hann fór til botns áraka pakkhúsið hjá Skipafelagnum.

### Froskmaður fekk ikki luft

Eingin var í bilinum, tá ið hann fór á sjógv, men av tí at viskararnir á bilunum bráddliga fóru í gongd, beint áðrenn bilurin fór til botns, fóru fólk at stúra fyri, um okkurt barn, uttan at nakar hevði varnast, hevði smoygt sær í bilin.

Tí fóru froskmenn hjá sløkkiliðnum útí, og teir kavaðu niður til bilin. Teir kundu skjótt staðfesta, at ongin var í bilinum. Tí fóru froskmenninir undir at seta endar, sum vóru festir í ein kranabil á bryggjuni, fastar í bilin á havsins botni, so at hann kundi fáast upp á turt aftur.

Meðan froskmenninir eru niðri, kemur annar teirra bráddliga upp í vatnskorpuna við ongari masku, og maðurin var sjónliga illa fyri. Hann rópar til starvsfelagarnar á bryggjuni, at hann fær ikki luft. Froskmaðurin, sum hevði fingið nógvan sjógv í seg, fekk fatur á endanum av krananum hjá kranabilinum, og har krøkti hann seg fastan, meðan hann royndi at koma fyri seg. Boð vóru send eftir hinum kavaranum, sum var niðri á botninum, og hann kom skjótt upp at hjálpa makkaranum. Saman við sløkkiliðsfólki og løgreglu á landi eydnaðist tað so at fáa illa fyrikomna froskmannin upp á turt, har hann so líðandi kom fyri seg.

### Endi slitnaði

Nú var so farið undir at fáa bilin upp á turt, og kranabilurin royndi at toga bilin upp av havsins botni. Tá ið bilurin var komin upp úr vatnskorpuni, slitnaði bráddliga annar endin, sum var á bilinum, og hann rakti ein mann hjá sløkkiliðnum, ið stóð á bryggjuni. Sløkkiliðsmaðurin fór um koll, men tíbetur fekk hann ongan skaða av óhappinum.

Tað eydnaðist løtu seinni at fáa bilin upp á bryggjuna, men bilurin hjá Skipafelagnum verður tó ongantíð aftur til bil, so illa var hann farin.

